# SAMSTARVSAVTALA

MILLUM

FØROYA LANDFÚTA

OG

Eiðis & Sunda KOMMUNUR

um upptøku av leysum hundum
og
um upptøku av øðrum smádýrum
í kommununum.

Við heimild í løgtingslóg nr. 82 um hundar frá 19. juni 1993 § 3, stk. 2, og lóg nr. 171 frá 18. mai 1937 for Færøerne om hegn og markfred, umframt rættargangslógina, er gjørd henda samstarvsavtala um upptøku av leysum hundum og øðrum dýrum, umframt annað arbeiði.

## HUNDAR

Fráboðan um, at hundur gongur leysur á økjunum: gøtu, vegi, breyt ella øki, sum eru opin fyri vanligari ferðslu, verður givin VAKTLEIÐARANUM á **politistøðini í Tórshavn**, ið gevur boðini víðari til **aktingarmannin**, sum kommunurnar hava sett. Aktingarmaðurin tekur hundin upp og boðar politinum nærri frá upptøkuni á serligum skjali, ið skal sendast til **fo-vagtcentral@politi.dk.**

Er upptøkan eftir metan aktingarmansins ov stór ella ov torfør fyri hann einsamallan, hevur politiið skyldu at veita honum hjálp.

Hevur upptikin hundur fyrisett spjaldur, boðsendur politiið ánaranum. Hevur hann ikki innan tríggjar ferðir 24 tímar frá tí, boðað er frá, loyst hundin móti at rinda tey gøld, sum staðist hava av upptøkuni, verður hundurin avhendaður ella avlívaður.

Hevur upptikin hundur ikki fyrisett helsi ella spjaldur, lýsir politiið eftir ánaranum. Hevur ánarin ikki innan tríggjar ferðir 24 tímar frá tí lýst er **í bygdatalvunum og á heimasíðu** hjá viðkomandi kommunu, loyst hundin móti at rinda tey gjøld, sum staðist hava av upptøkuni, kann politiið avhenda ella avlíva hundin.

## ONNUR DÝR

Seyður, ross, gæs, dunnur, høsn og onnur smádýr, sum politiið skal taka sær av sambært § 36 í lov om hegn og markfred og sambart rættargangslógini verða tikin ímóti eftir áheitan frá politinum.

## VARÐVEITSLUSTAÐUR

Eiðis & Sunda kommuna hava útvega eitt høli í kommununi, ið er hóskandi til upptykin dýr. Talan er um fjós í Tjørnuvík matr. nr. 3 og 26.

## GJØLD

**Hundar:**

| | | |
|---|---|---|
| Fast gjald............................................................. | kr. | 300,00 |
| Vistarhald fyri hvørt nýkomið samdøgur í varðveitslu............... | kr. | 125,00 |

**Kettur, kaninir og onnur smádýr:**

| | | |
|---|---|---|
| Fast gjald................................................................... | kr. | 125,00 |
| Vistarhald fyri hvørt nýkomið samdøgur í varðveitslu...................... | kr. | 35,00 |

Aktingarmaðurin og politiið taka støðu til gjaldið, um ivamál eru, t.d. viðvíkjandi tali/aldri av dýri ella varðveitslutíð.

## LOYSING/AVROKNING

Áðrenn hundur verður útflýggjaður ánara, **SKAL** politiið krevja ánaran eftir kostnað fyri upptøku av djórinum.

Útflýggjan av hundum og smádýrum fer fram eftir nærri avtalu millum politiið og aktingarmanning. Um dýrið ikki verður heintað, tá avtalað er, hevur aktingarmaðurin ikki skyldu at gjalda meirkostnaðin og gera nýggja avtalu um útflýggjan við politiið.

Aktingarmaðurin fær boð um, hvørji dýr eru útloyst, og **flytir hesi til avtalaða útflýggingarstaðin**.

Útflyggingarstøð eru matr.nr. 3 í Tjørnuvík og seyðahús á matr.nr. 437a í Svínáum.
Útflyggingarstaðurin skal avtalast við aktingarmannin.

Politiið skal avrokna loypandi inntøkurnar við **Sunda kommunu.**

## AVLÍVING/AVHENDING

Hevur ánarin ikki loyst dýrið móti at rinda kostnaðin, avhendar ella avlívar politiið dýrið.

Politiið stendur fyri avlívingini. Politinum stendur frítt fyri at gera avtalu við aktingarmannin um medvirkan.

## ANNAÐ

Politiið hevur yvirlit yvir upptikin dýr.

Samskiftið millum aktingarmannin og politiið fer fram umvegis VAKTLEIÐARAN á politistøðini í Tórshavn, tlf. 35 14 48.

Aktingarskipanin virkar alt samdøgrið.

Tá ið politiið biður aktingarmannin um hjálp til arbeiðið, sum tað áliggur politinum sum so at gera, t.d. sambært § 36: "Er husdyr indsat og dets ejer ikke kendes, kan det overleveres til politiet, som har at tage sig af det", verður arbeiðið gjørt eftir rokning og á sama hátt, um politiið annars biður um, at aktingarmaðurin ger ávíst arbeiði, eitt nú í sambandi við avlíving ella óhapp.

Avtalan er gjørd í trimum eintøkum og fær hvør partur sítt eintak.

Oyrabakki, tann 12/05-2015

Heðin Zachariasen, borgarstjóri
Sunda kommuna

Eiði, tann 12/05 - 2015

Jógvan í Skorini, borgarstjóri
Eiðis kommuna

Tórshavn, tann 18.05.2015

Føroya Landfúti
John Kølbæk
Politimester